Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sámal Hanni Lognberg, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Grótkastið uttan fyri Boðakeiina í Skopun

Spurningar:

1. Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera við tað, at alt grótið frá grótkastinum, sum varð lagt í nítiárunum, er endað inni á Pollinum í Skopun?
2. Nær verður farið undir at gera grótkastið aftur?
3. Nær ætlar landstýrismaðurin, at arbeiðið skal gerast at taka alt grótið upp, sum liggur inni á Pollinum í Skopun?

Viðmerkingar:

Alt grótið frá grótkastinum, sum bleiv lagt í nítiárunum, er endað inni á Pollinum í Skopun.

Ein kann undrast á, hví so man vera. Stutta frágreiðingin er helst, at hetta arbeiðið ongantíð bleiv gjørt liðugt. Grótið varð lagt uttanfyri boðakeiina, men forankringar vórðu ongantíð settar á grótið. Við teimum veðurumstøðum og tí harða streymi, sum er í Skopunarfirði, er óhugsandi, at hetta grót verður liggjandi uttan forankringar.

Grótið, sum er endað inni á Pollinum í Skopun, er ongantíð blivið tikið ordiliga upp. Vit hava sæð, at man hevur tikið tað ringasta upp, men alt, sum liggur inni á Pollinum er ikki tikið upp. Hetta er og kann eisini í framtíðini verða til stóran ampa fyri skip og bátar heimahoyrandi í Skopun og øðrum bygdum, sum nýta skopunarhavn. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 1. apríl 2022

Sámal Hanni Lognberg